## Hasj hjá tingformanninum

Í Grønlandi er Josef Motzfeldt, landstingsformaður, komin í andglettin, eftir at ein flytimaður hevur boðað frá, at hann fann ein klump av hasji í einari íbúð, sum tingformaðurin hevur búð í. Løgreglan í Nuuk váttar, at maðurin hevur latið løgregluni ein klump av hasji, men meiri vil hon ikki siga. Sambært blaðnum AG hevur maðurin greitt frá, at hann fann hasjið í einari reol í stovuni, tá hann og ein starvsfelagi vóru í ferð við at tøma fyrrverandi íbúðina hjá tingformanninum. Josef Motzfeldt avsannar alt. Hann sigur við AG, at hann hevur onganttíð brúkt hasj, men at tað er onkur, sum roynir at gera sær ónáðir.



## OECD kannar Útnorður

Um árslok næsta ár fer OECD at kunngera eina búskaparpolitiska meting av viðurskiftunum í Útnorði, og metingin verður roknað sum eitt týðandi grundarlag hjá Føroyum, Íslandi, Grønlandi og Vesturnoregi til at skipa framtíðar samstarv á, sigur KNR. Metingin hjá OECD fer at viðgera londini í Útnorði sum eitt øki, og hvørjar møguleikar og førleikar tað hevur, sigur Lars Tholstrup við KNR. Hann starvast á aksrivstovuni hjá NORA, ið hevur høvuðssæti í Havn. Norðurlendska ráðharraráðið er við til at fíggja metingina hjá OECD.

# Løgtingið hevur góðtikið nýtsluna



*Jógvan Sundstein: -Løgtingið hevur samtykt landskassaroknskapirnar fyri 2005 og 2006 og hevur harvið góðkent meirnýtsluna hjá Hans Paula Strøm og hinum landsstýrismonnunum -Tað ber ikki til at lata Landssjúkrahúsið aftur, tí játtanin ikki heldur*

**– Sjálvandi er tað ein trupulleiki hjá teirri politisku skipanini, at tað, sum er játtað á fíggjarlógini, ikki sam, svarar við ta veruligu nýtsluna. Men haðani og til at siga, at talan er um lógarbrot, er eitt í so langt lop, sigur Jógvan Sundstein, fyrrverandi løgtingsmaður, løgtingsformaður, landsstýrismaður og løgmaður í viðmerking til kjakið um meirnýtsluna hjá Hans Paula Strøm, landsstýrismanni við Sosialin**

HEIMILDARLOYSI
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Jógvan Sundstein sigur, at løgtingsfíggjarlógin er lutvíst ein játtanarlóg og lutvíst eitt budsjett, og tí ber tað ikki til at krevja, at roknskapurin og játtanin skulu samsvara upp á oyrað. Tað ber heilt einfalt ikki til. Tí er tað eisini burturvið at krevja, at tað skal vera grundgeving fyri, at ein landsstýrismaður skal noyðast frá. Tað gevur púra onga meining, sigur Jógvan Sundstein.

– Men hvussu skal tað tulkast, tá lógin sigur, at eingin útreiðsla skal fremjast, uttan at játtanm fyriliggur í fíggjarlógini ella aðrari játtanarlóg?

Jógvan Sundstein sigur, at sjálvandi skal ein játtan vera. Men tað er ikki bara fíggjarlógin, sum er ein játtan, og lógin vísir tí eisini til aðrar játtanarlógir.

### Lógarbundnar útreiðslur

– Hyggja vit at hesum málinum, so snýr tað seg um meirnýtslu innan almannamál og heilsumál. Taka vit almannamálini fyrst, so eru næstan alt lógarbundnar útreiðslur, sum sostatt hava heimild í aðrari játtanarlóg. Eitt nú er ein stór meirnýtsla innan fyritíðarpensjón, men lógin um fyritíðarpensjón sigur, at øll, sum hava rætt til fyritíðarpensjón, skulu fáa pensjónina útgoldna. Er ikki nóg mikið sett av á fíggjarlógini, má játtanin yvirtrekkjast, tí tann lógin gongur fram um fíggjarlógina, sigur Jógvan Sundstein.

Hann sigur, at sjálvandi skal viðkomandi landsstýrismaður koma við einum uppskoti um eykafíggjarlóg afturat tí, sum stendur á fíggjarlógini, men tað hevur uppaftur størri týdning, at landsstýrið leggur seg eftir at leggja eina fíggjarætlan, sum veruliga samsvarar við tørvin.

Jógvan Sundstein leggur afturat, at í tí partinum, sum snýr seg um almannamálini, er meirnýtslan 88 milliónir krónur brúktar ov nógv, men av teimum eru tær 85 milliónirnar lógarbundnar eftir aðrari játtanarlóg. Sostatt eru bara tríggjar milliónir eftir.

### Kann ikki steðga upp

Tá talan er um meirnýtsluna á heilsuøkinum, er støðan eitt sindur øðrvísi, tí her er ikki talan um lógarbundnar útreiðslur á sama hátt sum innan almannamál. Tey stóru tølini frá meirnýtsluni stava frá teimum trimum sjúkrahúsunum og serviðgerð uttanlands.

– Her kunnu vit siga, at hetta er meirnýtsla út yvir tað, sum fíggjarlógin játtar, og at her er eingin onnur lóg, sum gevur heimild til meirnýtsluna. Her er talan um skeiva meting og ov tilvildarligt eftirlit, sigur Jógvan Sundstein. Hann vísir í hesum viðfangi á, at tað er ikki so langt síðani, at Løgtingið valdi at játta minni, enn landsstýrismaðurin bað um, og at tá er úrslitið givið frammanundan.

Jógvan Sundstein minnir í hesum sambandi á eina fíggjarlógarviðgerð í sekstiárunum. Kristian Djurhuus var landsstýrismaður í fíggjarmálum, og undir orðaskiftinum fór hann upp á røðarapallin og ásannaði, at landsstýrið hevði brúkt meiri, enn fíggjarlógin játtaði, men at tað bar ikki til at leggja alt stilt, tá árið fór at halla, tí játtanin ikki rakk.

– Hetta er eisini galdandi í dag. Hans Pauli Strøm kann ikki lata Landssjúkrahúsið aftur, tí játtanin á fíggjarlógini ikki røkkur, sigur Jógvan Sundstein.

### Góðkent í Løgtinginum

Fyrrverandi landsstýrismaðurin í fíggjarmálum sigur, at trupulleikin við meirmýtslu er ikki nakað serfyribrigdi fyri Hans Paula Strøm og heldur ikki bara fyri almanna- og heilsumál. Hinvegin er tað ein veruleiki, at hann hevur mettskeivt, tá fíggjarlógirnar eru lagdar, og at hann hevur verið ov seinur at biðja um eykajáttan. Men hann hevur eisini havt tann politiska trupulleika, at Løgtingið hevur játtað minni, enn hann hevur mælt til ella biðið um, og at Løgtingið ikki hevur játtað honum eykajáttan, fyrr enn eftir at útreiðslurnar eru falnar til gjaldingar.

Jógvan Sundstein heldur ikki, at landsstýrismálanevndin hevur viðgjørt málið um Hans Paula Strøm nóg gjølla og út frá egnum fyritreytum. Nevndin hevur viðgjørt nøkur tøl, sum landsgrannskoðanin er komin fram til, og sum sjálvandi eru røtt. Men sambært Jógvani Sundstein gloymir landsstýrismálanevndin, at Løgtingið á hvørjum ári hevur góðkent landskassaroknskapirnar við viðmerking frá grannskoðarunum um, at landsstýrið hevur brúkt meiri pening enn játtað.

– Løgtingið samtykt landskassaroknskapirnar fyri 2005 og 2006, og var tað lógarbrot, tá landsstýrismenn brúktu meiri enn tann játtaða peningin, so hevur Løgtingið staðfest lógarbrotið. Og tá tann lóggevandi myndugleikin hevur góðkent tað, sum er farið fram, ber tað ikki til at koma eftir einum landsstýrismanni aftaná, sigur Jógvan Sundstein.

### Eiga at læra

Jógvan Sundstein er partvíst samdur við Annfinni Kallsberg, fíggjarnevndarformanni, sum segði við Sosialin fyrr í vkuni, at nú ræður um at hyggja frameftir.

– Sjálvandi skal ein hyggja frameftir, men tað er eisini umráðandi at læra av tí, sum er hent, og sum liggur í hesum málinum. Samstundis skal ein gera sær greitt, at útreiðslurnar til eitt øki sum almannamál eru játtaðar í øðrum játtanarlógum og tí ikki neyðturviliga samsvara við játtanina, tá uppgjørt verður.

– Er hetta við øðrum orðum ein trupulleiki, sum vit ikki sleppa undan?

– Hetta er ein trupulleiki, sum eigur at eggja politikarunum til eitt neyvari fíggjarlógararbeiði, so fíggjarlógin samsvarar betur við veruleikan, og at tað, sum verður brúkt ov nógv, skal játtast við eykafíggjarlóg sum skjótast, sigur Jógvan Sundstein at enda við Sosialin.